## Óluva eigur 11 hundar

Óluva Johannesen, sum býr á Signabø, hevur stóran tokka til hundar – ikki minst lítlar, fittar chihuahua-hundar. Hon eigur ikki færri enn 11 hundar, umframt at hon venur aðrar hundar, sum hon hevur í húsinum. - Hundar eru ótrúliga fittir. Summi halda kanska, at 11 hundar eru nógv, men eg haldi ikki, at tað er for nógv, sigur hon. Óluva hevur nógvar chihuahua-hundar. Teir eru lítlir og fittir og skulu viga millum í mesta lagi 3 kilo.



## Lítlir hundar hittast

Óluva Johannesen er hundaalari, og hon er eisini instruktørur hjá teimum, sum hava hug at venja og ala hundar í Føroyum. Óluva arbeiðir serliga við chihuahua og Yorkshire terrier hundum. Tann 14. mars verður skipað fyri hundatreffi millum hesar smáu hundar. Fólk og hundar møtast við Royndarstøðina í Kollafirði. Tey, sum vilja vita meira um tiltakið, kunnu leita inn á heimasíðuna huff.dk

# ein nýggjan front



*Óli Breckmann og Frændur vóru í livligum kjaki á Rás2 leygarkvøldið*

*Myndir : Jens Kr. Vang*

ganga friðargongur og kravgongur í 80'unum, og tað helt hann var sjálvsagt at gera.

- Eg gekk friðargongu, tí eg vildi broyta heimin. Eg var ímóti vápnadubbingini hjá báðum síðum, og tað vildi eg gera vart við. Millum annað, tá ið USS McCloy kom inn á Havnina.

- Á, tann deiligi dagur, segði Óli Breckmann í einari skjótari vending.

- Nei, tað var ein sorgardagur, tí vit vistu ikki, um tað vóru kjarnorkuvápn umborð, og sjálvandi mótmæltu vit. Aftaná tað vóru vit hongd út í Dagblaðnum, men eg tók tað ikki so tungt. Eg helt, at að var ein æra at verða hongdur út í Dagblaðnum, segði Eyðun Nolsøe.

### Øll broytast

Kjakið millum Óla Breckmann og Frændur var lívligt, men teir dugdu eisini at skemta eitt sindur við gamla stríðnum, og hvussu fólk broytast við árunum.

Steintór Rasmussen tók eitt sindur saman um og helt, at øll fólk broytast – sjálvt Óli Breckmann.

- Vit eru allir broyttir síðani 80'ini – ivaleyst til tað betra – men eg havi havt hug at halda, at tann einasti persónurin, sum ikki hevur broytt seg, hevur verið Óli Breckmann. Tað haldi eg, at eg havi hoyrt í kjaki fyri stuttum, men her í kvøld er tónin eitt sindur øðrvísi, so kanska skuldi hetta góða høvi til, at Óli broytti seg eitt sindur, segði Steintór Rasmussen.

## Óli elskaði tónleikin hjá Frændum



Óli Breckmann var eirindaleysur í sínum atfinningum av politisku protestsangunum hjá Frændum í 80'unum, men leygarkvøldið viðurkendi hann, at hann elskaði tónleikin hjá bólkinum.

- Skal eg siga mína meining – og kanska gera nógv fólk bilsin – so havi eg altíð elskað tónleikin hjá Frændum, segði Óli Breckmann í sendingini Hvonn Live leygarkvøldið, og hann fekk lógvabrestir frá áhoyrarunum.

- Eg undirstriki, at mær dámdi tónleikin. Mær dámdi enntá nakrar av sangunum, og eg havi ofta upplivað, hvussu stóran týdning sangirnir hjá Frændum hava til veitslur kring landið.

Tá ið Óli Breckmann síðani fekk høvi at gera viðmerkingar til politiska innihaldið í sangunum hjá Frændum, tá var tónin ikki so rósandi.

## Vóru í hvør sínari legu

Árni og Marnar Andreasen vóru gestir í Hvonn Live leygarkvøldið. Teir sungu nakað so óvanligt sum ein Frændur-sang, og tað gjørdu teir við einum smíli, hóast teir vanliga syngja eitt annað slag av tónleiki.

Og tað hevur ikki bara verið munur á Árna & Marnar og Frændum tónleikaliga – tað var eisini stórur politiskur munur í 80'unum.

- Vit vóru sera høgraorienteraðir, og teir vóru hinumegin veitina, so tað var eitt sindur av stríði aftur og fram, men ta var ein sjarmerandi tíð, segði Árni Andreasen.

Men politiska ósemjan hevur ongantíð verið størri enn so, at teir ikki hava kunnað lurtað eftir Frændum.

- Eg havi stóra virðing fyri Frændum. Teir hava gjørt nógvar frálíkar sangir og góð løg, segði Marnar Andreasen.



*Árni & Marnar sungu um Hundin brúna*

*Mynd: Jens Kr. Vang*